


**SERBIAN IRON HORSE**

*Serbiski jarn-hesturin, Dmitrije Jankovic, er aftur í B36 verjuni til dystin móti gomlu liðfeløgum hansara*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Trupul útidystur hjá B36

**VODAFONEDEILDIN** Eftir eina sera góða byrjan uppá kappingarárið, hevur B36 í seinastu tveimum dystunum bert fingið tvey stig, og tað er ikki gott nokk, tá mótstøðuliðini vóru AB og ÍF. Sunnudagin skal B36 leika truplan útidyst móti FC Suðuroy, sum áður hevur víst at teir gott kunnu býta frá sær

Ólavur Øre Hansen

B36 eru komnir niður aftur á jørðina eftir eina fantastiska byrjan uppá kappingarárið. Seinastu tveir dystirnar hevur úrtøkan bert verið tvey stig, og tað er ikki nøktandi fyri árstalsfelagið. Serliga í síðsta dysti móti ÍF høvdu teir hvítu og svørtu úr høvuðstaðnum, allar møguleikar at avgera dystin, men kendu ikki sína vitjunartíð.

Hóast FC Suðuroy er uppflytari, so hava teir í ár víst, at teir gott kunnu geva hinum liðunum skarpan gang. Tískil skal B36 kenna sína vitjunartíð vesturi á Eiðinum sunnudagin

Hjá B36 er tað ein kærkomin styrkur at hava verjuleikarnar Dimitrije Jankovic og Herbert í Lon Jacobsen við aftur, eftir at teir sótu uttanfyri við skaða í dystinum móti ÍF.

## Tað er kærkomin styrkur hjá B36, at hava Dmitrije og Herbert við aftur

Uppflytarnir úr FC Suðuroy hava í ár víst, at teir kunnu arga hini liðini. Javnleikurin móti HB í fyrsta umfari talar fyri seg.

Men tað er á heimavølli at flestu stigini hjá felagsliðnum skulu fáast til høldar. Higartil hevur FC Suðuroy leikt tveir heimadystin í landskappingini, og hava teir fingið fýra av fimm stigum vesturi á Eiðinum. Teir vunnu móti B68 og leiktu javnt móti NSÍ.

Í síðsta Vodafonedystinum tapti FC Suðuroy á útivølli móti B71. Til tann dystin vóru suðuroyingar nakað skerdir, serliga í verjupartinum. Eitt nú hevði Martin Tausen leikbann. Men til dystin sunnudagin, hevur venjarin hjá FC Suðuroy, Jón Pauli Olsen, aftur allar mans tøkar.

post@sosialurin.fo

# Vinn ella ...




*NSÍ og Christian Høgni Jacobsen hava mangan trupulleikar móti sundalgsmonnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**VODAFONEDEILDIN** Tað eru tvey lið, sum hava brúk fyri stigum, ið bresta saman við Løkin í kvøld

Ólavur Øre Hansen

Um NSÍ og EB/Streymur skulu hava møguleikar at hanga við í ovaru helvt, so er ein sigur eitt krav

Felags fyri NSÍ og EB/Streym er, at tey hava ikki fingið eina góða byrjan uppá kappingarárið, og tískil skulu bæði liðini hava trý stig, fyri ikki at missa sambandið við ovaru liðini.

Kappingarárið hjá NSÍ hevur als ikki gingið eftir vild. Fýra stig eftir fimm dystir er ikki nógv fyri runavíkingar, men tað eru glottar at hóma. Týskvøldið vann NSÍ ein greiðan heimasigur á AB, og vístu runavíkingar til tíðir sera gott spæl móti argjamonnum.

Pauli Poulsen, venjari hjá NSÍ, hevur allar mans tøkar til dystin móti EB/Streymi, og hevur tí møguleika at úttaka somu mans, sum byrjaðu inni í dystinum móti AB.

Eins og hjá runavíkingum so hevur úrtøkan hjá EB/Streymi í ár verið soltin. Tap á heimavølli móti HB og B36, tala um eitt EB/Streymalið, sum ikki heilt er har, sum teir einaferð vóru. Tískil skulu sundalagsmenn prógva at teir eru betri, enn stigatalvan vísir, og tí er ein sigur á runavíkingum eitt krav.

## Meðan runavíkingar kunnu stilla upp við sterkasta liði, er støðan ein heilt onnur hjá EB/Streymi

Meðan runavíkingar kunnu stilla upp við sterkasta liði, er støðan ein heilt onnur hjá EB/Streymi. Sundalagsmenn eru hart raktir við skaðum í ár, og í dystinum móti HB sunnudagin blivu Alex José dos Santos og René Tórgarð skaddir. Heðin Askham sigur í stuttari viðmerking við Sosialin, at teir báðir eftir øllum at døma ikki vera við í hópinum til dystin í Runavík.

Hinvegin, so verður Arnbjørn Hansen við frá byrjan, eftir at hann byrjaði á bonkinum sunnudagin. Arnbjørn hevur verið sjúkur, men er nú klárur aftur.